## Stjólu nýføðingar

Løgreglan í Meksiko hevur tikið tríggjar læknar og tvey onnur starvsfólk á einum sjúkrahúsi, sum eru skuldsett fyri at hava rænt minst tveir nýføðingar á einum privatsjúkrahúsi. Sambært ákæruvaldinum fingu foreldrini at teimum rændu børnunum at vita, at børnini vóru deyð. Seinni vórðu bæði børnini funnin á lívi. Ákæruvaldið sigur, at læknarnir og teirra hjálparfólk fingu umleið 5.000 krónur fyri hvørt barnið. Nú verður kannað, at tey fýra hava rænt onnur børn, skrivar AP.



## Ketta fekk svínakrím

Amerikanska landbúnaðarmálaráðið og djóralæknamyndugleikarnir í statinum Iowa kunngjørdu í gjár, at teir hava staðfest, at ein ketta er vorðin smittað við H1N1. Sagt verður, at tey, sum eiga kettuna, hava drigist við krímsjúkuna í seinastuni, og tí eru tað helst tey, sum hava smittað ta 13 ára gomlu kettuna. Amerikanskir læknar hava annars sagt, at tað er ikki sannlíkt, at H1N1 smittar frá fólki til djór ella øvugt, men tilburðurin við kettuni í Iowa tykist benda á, at hendan uppfatanin má endurskoðast, skrivar AP.

# Endiliga kom bókin um Ernestine




**BÓKAÚTGÁVA**
*Dávur Winther*

Henda serstaka hendingin, sum nógv hevur verið tosað um, kemur nú út í bók sum Páll Kunoy hevur skrivað. Útgávudagur og framløga av bókini »Ernestine« verður mikudagin 11. november kl. 19.30 - í býráðshøllini í Klaksvík.

Páll Kunoy minnist serliga væl tosið millum eldru menninar í Kunoy um hendingina, tá ið Ernestina fór á land undir Selvíksbjørgum í 1930.

Páll Kunoy greiðir frá, hvussu abbi hansara, Christoffur Kunoy, fortaldi honum um sváru løtuna, tá ið Kjølbro sendi telefonboð til sín, sama dagin sum lagnuboðini um Ernestine komu til Klaksvíkar.

Abbin varð biðin av Kjølbro at fara í eitt hús í Kunoy at bera sorgarboðini til 29 ára gamla einkju, sum nú sat eftir við fimm børnum. Hetta vóru tyngstu fet hjá abbanum á foldum, greiddi hann frá.

»Ernestine« er bókin, sum greiðir frá søguni hjá tí, sum tá varð kallað ein av Føroya vakrastu skonnartum. Dávur úr Gerðum, skipari hevði sæð hana undir Íslandi, har franskmenn fiskaðu við henni. Honum dámdi skipið væl, og tað eydnaðist saman við bróðrinum J. F. Kjølbro í 1927 at keypa Ernestine úr Fraklandi.

Ernestine gjørdist ikki langt lív lagað á føroyskum hondum. Longu trý ár eftir fórst hon undir Selvíksbjørgum í Íslandi.

Tað sigst, at tá ið teir menninir, sum komu undan hendingini við lívinum hittust, fevndust teir og talaðu lítið.

Tað, sum fram um alt stendur eftir frá hesum skipsbroti, er eitt av teimum allarstørstu bjargingarbrøgdunum, ið framd eru í føroyskari siglingarsøgu.

Bókin um Ernestine er ein roynd at greiða frá hesum skaðatilburði og sjáldsama og ótrúliga bjargingaravriki, ið Ziska Jacobsen gjørdist kendur og virdur fyri.



*Klaksvík umleið 10 ár eftir, at »Ernestine« kom*
*Myndaeigari: FFS*



*Avhálaðir á Suðurlandinum. Allir menn við snørið*
*Myndaeigari: FFS*



*»Ernestine« nýliga komin til Føroya í 1927*
*Myndaeigari: FFS*

> *»Skiparin heitti tá á Ziska Jacobsen, ið var góður svimjari, um at royna at svimja í land, men skiparin sá tó, at brimið breyt langt upp í bergið. Sjálvt um Ziska tá hevði kunnað svomið inn ímóti landi, hevði ikki verið gjørligt at komið á land«.*

## FAKTA

Klýpir til fiskivinnusøgu Klaksvíkar:
Ekliptika - (fórst í 1941)
Jákup Heinesen skrivaði í 2001.
Lívsbargdagi á Kappanum – søgan um Coronert
Páll Kunoy skrivaði í 2006
Fossánes – Bóru ikki boð í bý - (fórst í 1938)
Páll Kunoy skrivaði í 2007
Ernestine - (fórst í 1930)
Páll Kunoy skrivaði í 2009

## Bókin løgd fram í Býráðshøllini mikudagin

Á samkomu sum verður í býráðshøllini í Klaksvík mikudagin 11. november klokkan 19.30 verður bókin »Ernestine«, sum Páll Kunoy hevur, skrivað løgd fram.

Jógvan Skorheim, varaborgarstjóri bjóðar vælkomin.

Jógvan Ravnsfjall ummælir bókina og høvundurin, Páll Kunoy, sigur nøkur orð um arbeiðið við at savna tilfar og skriva bókina.

Sangur, kaffi og hugnaprát verður samstundis sum til ber at ogna sær bókina.

Eisini ber til at fáa bókina signeraða.